# Norðoya Vistarheim fingið ein Berlingo

**Í dag byrjar nýggi bilurin hjá Norðoya Vistarheimi at koyra døgurðar út til eldri í Klaksvík. Í nógv ár hava heilsuhjálparar heintað døgurðarnar á Vistarheiminum; til hesa koyring hava tær nýtt egnu bilar sínar. Tað eru virkir, feløg og privatpersónar, ið hava stuðlað tiltakinum**

ELDRARØKT
*Rúna Sivertsen*



*Eydna Dragaberg, leiðari, á Norðoya Vistarheimi í nýggja bilinium hjá Vistarheiminum.*

Norðoya Vistarheim hevur í nógv ár gjørt døgurðar til eldri, sum búgva heima, men ikki sjálvi eru før fyri at matgera.

Døgurðarnir eru síðani heintaðir av heilsuhjálparum, sum av vælvild hava nýtt sínar egnu bilar til hesa koyring.

Í februar tóku tey á Norðoya Vistarheimi, við dygggum stuðli frá nevndini, stig til at savna pening inn at keypa bil fyri.

Innsavningin hevur gingið væl, og longu nú eru tey á Vistarheiminum eydnusamir eigarar av einum Citroën Berlingo.

Virkir, feløg, stovnar og privatpersónar og búfólk á Vistarheiminum hava latið pening, so bilurin kundi keypast.

- So at siga allar fyritøkur í býnum hava stuðlað tiltakinum; sjálvt teir smæstu handlarnir, sigur Eydna Dragaberg, leiðari, á Norðoya Vistarheimi.

- Vit eru serstakliga takksom fyri ta góðu undirtøku, hetta tiltak hevur fingið, sigur Eydna.

Ein av góðveðursdøgunum í summar høvdu vit køkutombola uttanfyri Vistarheimið. Tað eydnaðist væl, og 20.000 krónur komu í kassan, sigur hon.

Bilurin tekur 5 persónar, og skal hann eisini nýtast til smáar útferðir og annan flutning hjá búfólkunum, sigur Eydna Dragaberg at enda.

# Gongur væl hjá Christiani í Grótinum

**Christian í Grótinum kom á Klaksvík sunnukvøldið um nátturðatíð við fullari last av svartkjafti og fór seinni um kvøldið á Fuglafjørð at landa**

FISKIVINNA
*Solby A.Eliasen*

**Klaksvík:** Hesin túrurin hjá Christiani í Grótinum var ein av teimum longru túrunum, tí tað viðraði stak illa. Veðrið hevur nógv at siga, tá talan er um svartkjaft, tí tá veðrið so er batnað aftur, kann tað taka upp til tveir dagar, áðrenn svartkjafturin samlar seg aftur, so tað loysir seg at royna eftir honum.

Palli Ziskason frá Pf Christian í Grótinum sigur, at hann hevur ikki tosað við nakran av monnunum enn, men hann veit kortini at siga, at hósdagurin var góður hjá teimum.

- Sum eg havi skilt, versnaði veðrið aftur fríggjadagin, men hóast tað, gekk tað gott. Ta seinastu náttina mundu teir fáa um 500 tons, sigur Palli Ziskason.

Spurdur um, hvussu teir eru nøgdir við árið hjá Christian í Grótinum higartil, svarar Palli, at alt sjálvandi kann gerast betur.

- Samanborið við hesa tíðina í fjør hevur skipið fiskað fyri fimm milliónir minni í ár. Men sum heild eru vit væl nøgd, kortini, sigur hann.

Christian í Grótinum verður verandi í svartkjafti í eina tíð afturat, síðani verður farið at royna eftir makreli.

Skipið lá eina løtu á Klaksvík sunnukvøldið, men fór so á Fuglafjørð at landa tey 2.000 tonsini, sum teir høvdu fingið.

Christian í Grótinum fór avstað aftur seinnapartin mánadagin.

Palli Ziskason sigur, at Norðborg er á sildaveiðu, og teir landa í Norra.

Teir hava nóg mikið at gera.



*Christian í Grótinum kom á Klaksvík sunnukvøldið við fullari last av svartkjafti*



# Ring útlit fyri tunli til Dals



*Vegurin gjøgnum Dalsberg er gamal og smalur og ikki sørt vandamikil heldur, har hann liggur í brattlendinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Dalbingar skulu ikki vænta sær tunnil við tað fyrsta, kom fram av svarinum, sum Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, fekk frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, upp á fyrispurning um tunnilsgerð til Dals**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Dalur:** Fyribils verður einki gjørt við tunnil til Dals. So stutt kann svarið frá landsstýrismanninum við samferðslumálum týðast, heldur sandoyartingmaðurin, Gerhard Lognberg.

Gamli vegurin til Dals er bæði smalur og ørandi at koyra eftir. Serliga hjá honum, sum ikki er vanur at koyra á slíkum støðum. Bilverja er í ytra borði, men stegðar tú á og hyggur omanav, ræður um at hava góðar nervar.

Og her koyra bussar hvønn dag við bæði skúlabørnum og øðrum ferðafólki, umframt aðra ferðslu, sum fer gjøgnum bergið.

Tí berg er í bæði borð, og bergið er ikki støðugt. Har hendir alla tíðina okkurt, og javnan kemur grót á vegin.

Seinasta sunnudag leyp eitt rættiliga fitt lop, og heilt nógv grót endaði á vegnum. Tíbetur stóðst eingin mansskaði av. Men fólk, Sosialurin hevur tosað við, og sum vóru á Dalsvegnum um tað mundið, lopið var, siga, at rakti tað ein bil, var eingin ivi um, at ein stór vanlukka hendi.

Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, heldur, at nú hava dalbingar livað nóg leingi við hesi støðuni. Og hon er ikki haldbar, sum hon er. Langt frá tí.

Dalur er bygd í menning, vísir hann á. Har er fólk flutt til. Virki sett á stovn, sum flyta framleiðslu sína um alt landið. Og nógv av fólkinum í Dali ferðast úr bygdini hvønn dag. Til flakavirkini oynni fara tey til arbeiðis, eins og fleiri fara í skúla í Sandoyar Meginskúla.

## Fyrispurningur á tingi

Fyri at fáa meira ferð á kjakið um samferðsluna til og úr Dali, setti Gerhard Lognberg Bjarna Djurholm, landsstýrismanni við samferðslumálum, fyrispurning á Løgtingi. Gerhard Lognberg spurdi Bjarna Djurholm um, hvat gjørt er í málinum higartil, og í øðrum lagi um nakrar fyrireikingar eru farnar í gongd.

– Men har kom einki svar soleiðis, sigur Gerhard Lognberg, ið sum vitiligt er ikki er nøgdur við tað, hann fekk at vita.

Bjarni Djurholm svaraði beinleiðis, at einki er sett av til hetta arbeiðið, og at tað verður tað heldur ikki við tað fyrsta.

– Hann segði okkurt um, at okkurt er kannað, men einki verður gjørt, tí onnur øki eru meira vandamikil enn hetta, sigur Gerhard Lognberg.

Men hann ætlar sær ikki at gevast so kortini, sigur hann og boðar frá, at hann fer at taka málið uppaftur.

– Tað er nú løgið, at einki skal vera neyðugt nú, heldur Gerhard Lognberg og vísir á, at beint undan valinum helt sama samgonga, sum enn situr, at tað var sera átrokandi at játta 475.000,- krónur til at fyrireika berghol millum Húsavík og Dal.

– Men tað var rímiligt bara valagn, sum samgongulimir als einki meintu við kortini, staðfestir Gerhard Lognberg.

## Lappaloysnir

Tað tykist, sum ferðsluviðurskiftini í Sandoynni koyra upp á lappaloysnir, sigur Gerhard Lognberg.

Í vár leyp eisini í Dalsbergi. Tá fór eitt rímiliga stórt lop undir vegnum, Heilt niðan undir sjálva koyribreytina.

Ta ferðina varð støðan mett so mikið hættislig, at onkur teirra, sum koyrdu stóru lastbilarnar, aftraðu seg við at fara til Dals. Tá var í fyrstu syftu skervur lagdur í rennuna í ovara borið, og ferðslan so beind heilt inn undir klettin oman fyri, har lopið var.

Seinni er so betongkantur stoyptur undir vegnum og ífylla løgd í aftur. Eitt sindur av oljugrúsi er lagt á vegin, og tað er so tað, vísa fólk, sum koyra dagliga eftir vegnum, á.

Eitt er dalsvegurin, men vegurin gjøgnum Sandslíð er lítið mætari. Hann er eisini heilt hættisligur at koyra eftir, sigur Gerhard Lognberg.

Tað hevur einki verið frammi við nakrari tunnilsgerð har, sigur løgtingsmaðurin, men hann heldur, at tíðin er komin til at tosa um í hvussu er beiðkan av tí vegnum. Tí øll ferðslan til Eysturbygdirnar fer eftir honum.

Annars er eitt annað stórmál, sum liggur fyri, vísir Gerhard Lognberg á. Tað er undirsjóvartunnil millum Samndoynna og Streymoynna.

Hann heldur ikki, at tað er órealistiskt at tosa um tað, tí tað má koma einaferð í framtíðini. Tó leggur hann dent á, at fyrst eiga norðoyingar tørn, men síðan má Sandoyggin vera tað næsta. Tekniskt er tað møguligt, og skal menningin av oynni standa við, er tað mestsum ein treyt, at fast samband fast við meginøkið.

– Men allarfremst liggur Dalstunnilin, sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður fyri Sandoyar valdømi.



*Eftir eitt lop í vár, varð stoypt og laðað upp undir vegkantin*
*Mynd: Edvard Joensen*